


Lesið eisini
ÍtróttaSosialin á
alnetinum:
www.sosialurin.fo

# Abbin er sera stoltur

*Johan Byrial Hansen heldur, at møguleikin at spæla á føroyska landsliðnum kann læta dyr upp fyri honum, sum annars ongantíð høvdu farið úr lási*



*Abbi er beinleiðis stoltur av, at eg havi fingið møguleikan at koma í landsliðshópin í føðilandinum hjá honum, sigur Johan Byrial Hansen millum annað*

***Mynd: Jonhard Hammer***

Tað eru ikki stórvegins útskiftingar í landsliðshópinum. Spælararnir eru so at siga teir somu hvørja ferð. Teir hava verið ofta saman, og teir flestu kenna allar hinar stak væl.

Tá landsliðið vandi á Svangaskarði í fyrrakvøldið, var ein nýggjur maður í hópinum. Hann eitur Johan Byrial Hansen, og hann hevur ongantíð spælt í føroyskum fótbólti.

At ein spælari kemur í landsliðshópin, uttan at hann hevur umboðað eitt føroyskt felag, er spildurnýtt. Ikki færri enn ellivu av teimum átjan, sum í hesum døgum eru á Svangaskarði, umboða útlendsk feløg. Men burtursæð frá nýggja manninum, sum eitur Johan Byrial Hansen, hava allir hinir, sum hava verið og eru í landsliðshópinum, spælt í einum av føroysku feløgunum, tá teir fyrstu ferð fingu landsliðsboð.

## Familjan

Eingin ivi er um, at Johan Byrial Hansen hevur rætt at umboða Føroyar í altjóða fótbólti. Mamman eitur Árna. Hon er av Toftum – systir Jógvan Martin Olsen, hjálparvenjara hjá Allani Simonsen. Pápin er hálvur føroyingur og hálvur dani:

– Abbi mín er úr Kollafirði. Hann eitur Johan Hansen. Hann hevur verið trúboðari, og í síni tíð var hann fyristøðumaður á sjómansheiminum í Havnini. Tað var tá, at pápi mín, sum eitur Leivur, og mamma hittust. Tey hava búð í Horsens, har eg eri føddur og uppvaksin.

*Hvat sigur familjan til, at tú nú ert úttikin at umboða Føroyar í fótbólti?*

– Mamma heldur tað vera sera spennandi, og henni dámar tað væl. Abbi er beinleiðis stoltur av, at eg havi fingið møguleikan at koma í landsliðshópin í føðilandinum hjá honum.

Hvar sigur felagið hjá tær til landsliðsmøguleikan?

– Teir í OB ynsktu mær tillukku, og so mintu teir meg á, at um eg spældi eina ferð á føroyska landsliðnum, so kundi eg ongantíð spæla á danska landsliðnum.

*Og hvat segði tú til tað?*

– Tað var eg greiður yvir, og tað havi eg ongar trupulleikar av. Eg fái møguleikan at spæla á einum landsliði nú, og eg veit ikki, um eg nakrantíð fái hann aftur.

Kennir tú teg sum føroying?

– Eg eri uppvaksin í Danmark, og danskt er fyrsta málið hjá mær. Men eg havi a.ltíð vitað, at eg havi djúpar familjurøtur í Føroyum, og um tað ikki gongur alt ov skjótt, so skilji eg eisini tað, sum verður sagt.

*Er tað langt síðani, at tú vart í Føroyum síðst?*

– Eg var og ferðaðist á Toftum fyri níggju árum síðani. Tá vandi eg við B68, og eg minnist, at eg spældi venjingardyst við unglingunum ímóti einum av yngru landsliðunum. So tað er ikki púra fremmant, at vera í hóslag við eitt føroyskt landslið.

*Nær gjørdist tú greiðir yvir, at møguleikin fyri at spæla á føroyska landsliðnum ikki var púra burtur?*

– Mikudagin ringdi Allan Simonsen. Hann boðaði frá, at eg var úttikin. Tað var fyrsta ferðin, at eg fekk eina ítøkiliga fráboðan um, at eg var inni í myndini. Síðsta vetur var upp á tal, at eg í ár skuldi spæla í føroysku landskappingini. Tá var møguleikin fyri landsliðnum nevndur. Eg endaði í OB, og so datt tað tosið burtur.

## Venjarin kendi mannin

Johan Byrial Hansen verður 25 ár 18. september. Inntil í summar hevur hann bara búð í Horsens, og tað er har, at hann hevur spælt fótbólt:

–Tey fyrstu árini í vakstramannafótbólti var eg á seriuliðnum hjá Horsens. Seinni kom eg á divisiónsliðið, og har havi eg spælt 120 dystir – eitt skifti saman við Jan Allani Müller, og Jens Erik Rasmussen var eisini har nakrar mánaðar. Horsens er í næstbestu deildini, men tá sáttmálaskeiðið við teir var liðugt í vetur, gjørdi eg av at royna okkurt nýtt. Tá OB í vár var áhugað at bjóða mær sáttmála, gjørdi eg av at taka av.

*Vart tú fulltíðar yrkisspælari í Horsens?*

–Yvirhøvur ikki. Har fór bara ein brøkpartur av tíðini til fótbóltin. Í OB er tað nógv øðrvísi, har eru vit umleið 20 fulltíðar yrkisspælarar. Hetta er púra nýtt fyri mær, men eg skal ikki klaga. Higartil havi eg spælt partar av seks dystum. Vónandi verður tað heilt skjótt, at eg fái pláss ímillum teir fyrstu ellivu.

*Hvussu ber tað til, at OB vísti akkurát tær áhugað?*

– Tað man hava verið venjarin, sum hevur havt ein fingur við í spælinum. Venjarin hjá OB eitur Troels Bech. Í 1999 var hann venjari hjá okkum í Horsens. Hann flutti úr Horsens og til Ikast. Hetta var stutt frammanundan, at Ikast og Herning gjørdu av at fara saman í FC Midtjylland. Tá varð yvirskot av spælarum og venjarum í nýggja felagnum. Troels Bech, ið er gift við Maluni, sum eisini er úr Føroyum, flutti til Odense, og so var tað, at felagið sendi boð eftir Johan Byrial Hansen.

## Møguleikarnir

Johan Byrial Hansen letur væl at móttøkuni, sum hann fekk hósdagin seinnapart:

·

– Eg havi ikki fingið muss og klemm, sum man sigur, men tað hevur næstan verið tætt við. Vit hava verið lítið saman enn, men spælararnir skulu eiga, at teir hava verið framúr vinarligir.

Johan Byrial Hansen dugir einki at siga um, hvørvítt hann verður á liðnum í morgin ella ikki:

– Um Allan Simonsen sigur, at eg skal spæla, so verði eg sera fegin. Um hann heldur, at eg skal sita á beinkinum so skilji eg hann væl. Tað er sjáldan at ein nýggjur maður kemur í hópin og fær pláss á liðnum upp á standandi fót.

*Kanst tú brúka føroyska landsliðssessin til nakað?*

– Eg havi, sum allir aðrir fótbóltsspælarar hava tað, nakrar dreymar. Tað at spæla á einum landsliði er altíð eitt stórt upplivilsi, sum vónandi eisini ber møguleika fyri ferðaminnum við sær. Altjóða fótbóltsdystir geva royndir, sum eiga at koma til góða í felagnum, og møguleikin fyri at fremmand feløg fáa áhuga fyri tær økiswt, um tú ert landsliðsspælari.

*Droymir tú um at gerast yrkisspælari í útlandinum?*

– Tað gera allir fótbóltsspælarar. Men eg veit, at tað er torført. Fyrsta treytin er at spæla á felags liðnum hvørja ferð. Málið hjá mær er at gerast fastur maður á liðnum hjá OB. Um tað eydnast, rokni eg við, at møguleikin fyri plássi á føroyska landsliðnum verður størri. Men tað skal arbeiðast miðvíst fyri at røkka málinum.

JH



*Tað at spæla á einum landsliði er altíð eitt stórt upplivilsi, sum vónandi eisini ber møguleika fyri ferðaminnum við sær*

***Mynd: Jonhard Hammer***



# Slovenar hava framvegis nakað at prógva

*Hóast nøkur framúr úrslit seinastu tvey árini, so skulu slovensku spælararnir í hesum endaspælinum prógva, at teirra góðu avrik ikki bara eru eitt upplop, men at teir veruliga hoyra heima millum tungu dreingirnar*

STEFAN Í SKORINI

Eftir at Slovenia sera óvæntað megnaði at spæla seg í EM-endaspælið í summar, varð liðið heiðrað við eini virðisløn frá FIFA.

Virðislønin var fyri at verða tað liðið, sum hevði tikið seg flest pláss fram á FIFA styrkilistanum í 1999. Henda virðisløn verður latin á hvørjum ári. Hetta var eftir at Slovenia endaði á øðrum plássi í sínum bólki. Síðani vann Slovenia samanlagt 3-2 á Ukreina í tveimum dystum, sum hevði við sær, at Slovenia fyri fyrstu ferð var at síggja í einum endaspæli.

Undankappingin til HM í Frankaríki í 1998 miseydnaðist skammiliga hjá slovenum. Liðið megnaði bara at fáa tað eina stigið til høldar og var vánaligast í sínum bólki. Føroyska landsliðið kláraði seg tá betur enn mótstøðuliðið sunnudagin.

Í undankappingini til EM í summar var liðið ikki til at kenna aftur. Nýggjur venjari hevði tikið við, og hann dugdi at fáa optimalt burturúr spælarunum. Slovenska liðið tók øll á bóli, tá teir eftir ein 1-1 javnleik í Kiev móti Ukreina høvdu spælt seg í endaspælið. Fyrri dysturin endaði 2-1 til slovenar.

Í endaspælinum væntaðu nógv, at liðið fór at vera kanonføði hjá liðum sum Jugoslavia, Spania og Noreg. Aftur hesaferð stóðu teir fyri tí óvæntaða. Tvey stig og ein málúrtøka á 4-5 eftir tríggjar dystir var ikki at skammast yvir, men heldur at fegnast um. Tað kundi tó lættliga verið enn betri, um Slovenia hevði megnað at hildið fast um eina 3-0 leiðslu móti Jugoslavia, sum eisini spældi við tíggju monnum.

Hetta ber boð um, at liðið avgjørt hevur sínar veikleikar, og okkara menn tí hava ein møguleika at fanga teir á skeiva beininum.

Fyri góðum tveimum vikum síðani spældi Slovenia ein venjingardyst móti Kekkia, sum er á fjórða plássi á FIFA styrkilistanum. Dysturin í Prag endaði við 1-0 sigri til slovenar. Tað var enntá uttan besta spælaran Zlatko Zahovic. So tað er líkt til, at liðið er sera væl fyri í løtuni, og tað verður tungt hjá føroysku spælarunum.

## Bara átta ára royndir

Hóast slovenska fótbóltssambandið varð sett á stovn í 1920, so fekk tað ikki fullan limaskap í UEFA fyrr enn í 1992 og í FIFA í 1993, av tí at landið ikki var sjálvstøðugt fyrr enn um tað mundið. Fyrsti altjóða skrásetti dysturin var í 1992 móti Estlandi, og hann endaði við javnleiki 1-1.

Slovenia var fyrstu ferð í eini undankapping í 1994, tá dystast skuldi um pláss í EM-endaspælinum í Onglandi í 1996. Fyrsti dysturin tá var móti HM finalistunum Italia og endaði 1-1, men seinni hevur úrtøka verið lakari.

Slovensk feløg hava eisini staðið seg avbera væl í europeiskum kappingum. Í fjør var Maribor Teatanic úr Slovenia við í fyrsta bólkaspælinum í Champions League, og á vegnum sendu teir franska liðið Lyon úr kappingini.

Hóast landið er lítið við bara 2 milliónum íbúgvum, og best umtóktu ítróttagreinarnar eru skí og kurvabóltur, so er tað eisini eydnast teimum at gera vart við seg á altjóða fótbóltspallinum.

## Zahovic og Katanec

Teir týdningarmiklastu limirnir á slovenska landsliðnum eru venjarin Srecko Katanec og stjørnuspælarin Zlatko Zahovic.

Eftir at Katanec tók yvir sum venjari á sumri í 1998, hevur liðið tikið seg ómetaliga nógv fram. Hann hevur givið spælarunum tað neyðuga sjálvsálitið, sum skal til fyri at spæla seg í eitt endaspæl.

Katanec hevur eina fortíð í Stuttgart og Sampdoria, har hann vann italska meistaraheitið, steypakappingina, Europa Cup fyri steypavinnarar. Eisini spældi hann í Europa Cup finaluni í 1992.

Hann leggur stóran dent á tað taktiska, og hvør spælari hevur eina ávísa uppgávu á vøllinum. Undantakið er Zahovic, ið fyri tað mesta ger tað, sum hann finnur best. Vanliga nýtir hann 3-5-2 skipanina við einum aftasta manni, og verjan plagar at trýsta langt frammi á vøllinum.

Zlatko Zahovic er einasta veruliga stjørnan á liðnum, og hann er eisini langt frammanfyri hinar, hvat bóltførleikanum viðvíkur. Hann er maðurin, sum skal standa fyri tí óvæntaða í álopsspælinum.

Vanliga liggur hann á offensiva miðvøllinum, beint aftanfyri áleypararnar. Eisini hevur Katanec onkuntíð sett Zahovic fram í álopið móti sterkari tjóðum fyri at fáa meira arbeiðsmegi á miðvøllinum. Hetta ger venjarin neyvan móti Føroym, og Zahovic verður væntandi á miðvøllinum.

Zahovic hevur víst seg at verða sera vandamikil, ikki bara sum uppleggjari, men kanska serliga sum málskjútti. Í níggju dystum í undankappingini til EM í ár, skeyt hann níggju av teimum fimtan málunum, sum liðið fekk. Í EM-endaspælinum var hann eisini ein vandamikil harri við trimum málum.

Hagtølini tala fyri seg. Í 49 landsdystum hevur 29 ára gamli Zahovic skotið 25 mál, so sjálvt um hann er miðvallari skýtur hann eisini málini á landsliðnum.

Zahovic hevur eisini vakt undran við sínum avrikum, og hann hevur í summar gjørt sáttmála við Europa Cup finalistarnar Valencia í Spania. Áður hevur hann spælt fyri Porto í Portugal og Olympiakos í Grikkalandi.

Ofta standast trupulleikar, har Zahovic er í nánd, og hann er ein sera umstríddur spælari. Hann var ikki við í dystinum móti Kekkia, tí hann og venjarin høvdu verið ósamdir. Í Olympiakos fór hann í verkfall fyri at sleppa til annað felag.

Flestu spælararnir koma úr miðalfeløgum í Eysturríki, Sveis, Belgia, meðan nakrir eisini spæla í Jugoslavia og Kroatia.

Av øðrum vandamiklum spælarum kann nevnast Miran Pavlin. Hann stóð seg so væl í EM, at Porto hevur gjørt sáttmála við hann.

## Undirmeta ikki føroyingar

Katanec leggur doyðin á, at hansara spælarar ikki skulu undirmeta føroyska liðið.

Nú hava teir sjálvir verið undirmettir av øðrum størri tjóðum og hava eisini tikið fleiri teirra á bóli. Teir hava ongar ætlanir um at fella í somu grøv, men taka uppgávuna í størsta álvara.

Ein skal ansa sær ikki at leggja ov nógv í tað, sum venjarar og spælarar siga undan einum dysti, tí tað eru altíð væl tugdar orðingar, sum verða nýttar aftur og aftur.

Tó skal havast í huga, at slovenar hava verið undirmettir líka síðan teir komu við í altjóða fótbólt. Teir kenna tí alt til vandarnar við ikki at taka allar dystir í álvara.

Hetta endaspælið fer at avgera, um slovenska liðið veruliga er ment at klára seg millum fremstu fótbóltstjóðir í heiminum. Fleiri eru framvegis ivasom um dygdirnar á liðnum og vænta ikki, at tað fer at eydnast teimum at vera í pottinum, tá lutakastið til HM-endaspælið verður. Luttøkan í EM-endaspælinum var tí bara eitt upplop, sum kemur fyri av og á innan fótbólt.

Hesar ákærur skulu slovenar nú rista av sær, og fyrsta stigið á leiðini verður tikið inni á Svangaskarði sunnudagin, har 11 svangir føroyingar eru klárir at taka dystin upp.

# Millumstøðirnar skulu vera færri

*Framrættaðu menninir vilja, at tað viðhvørt skal gerast skjótt av, og liðformaðurin ávarar ímóti, at tað verður kapprunnið ov nógv við mótstøðumenninar*

Eftir 2–0 tapið ímóti Danmark helt Todi Jónsson ikki, at tað var rætt, at føroyingar framvegis lata sær lynda at tapa við einum ella tveimum málum ímóti teimum, sum vitja í Føroyum. Men hann vísti samstundis á, at um føroyingar skulu fáa mál og harvið betri úrslit, so er neyðugt, at tað viðhvørt verður lopið meiri sannførandi á. Tað vil við øðrum orðum siga, at fleiri spælarar flyta seg longri fram á vøllin.

John Petersen er á mest framrættaða plássinum á miðvøllinum, og hann er ikki ósamdur við Toda:

– Vit megna ikki at leggja trýst á mótstøðumenninar, men í onkrum støðum kunnu vit verða betri til at leypa á. Eg hugsi um støðua, tá vit vinna bóltin av teimum frammarlaga á vøllinum. Tá kemur tað viðhvørt fyri, at vit ikki skunda okkum nóg nógv, og so fáa mótstøðumenninir tíð til at fáa javnvág í verjupartin. Viðhvørt skulu vit brúka fáar millumstøðir, tá vit flyta okkum fram á vøllin.

## Eingin kapprenning

Jens Kristian Hansen er ein av royndastu spælarunum á føroyska liðnum. Liðformaðurin hevur spælt 35 landsdystir, og hann ávarar ímóti, at føroyingar fara ov langt fram á vøllin:

– Sterkasta síðan hjá okkum er, at vit eru væl skipaðir í verjupartinum. Fyrsta málið er at halda teimum burtur frá okkara máli. Um vit megna tað nóg leingi, so fara teir at leypa framav. Tað ræður um at hava tol, heldur Jens Kristian Hansen.

Tað verður ofta tikið til, at føroysku spælararnir tykjast vera í betri venjing nú, enn teir hava verið áður. Jens Kristian er ikki ósamdur í hesum, men hann heldur, at tað framvegis er munur á:

– Tað sæst væl í 2. hálvleiki. Tá eru vit altíð móðari enn hinir, og so er vandin fyri mistøkum størri. Um vit fara at kapprenna við mótstøðumenninar, so minkar møguleikin hjá okkum, tí so møðast vit skjótari. Men eg skilji væl sjónarmiði og taki undir við, at vit gera skjótari av, tá vit vinna bóltin frammarlaga.

JH

*Todi Jónsson heldur, at føroyingar eiga at leypa meira sannførandi á, soleiðis at sannlíkið fyri málum verður størri*

